## DAGSINS MEINING

# Góða mamma tað var ikki eg...

Høgni Hoydal formaður Tjóðveldsifloksins roynir í viðmerking í blaðnum í dag at billa fólki inn, at kreppan, ið nú stendur fyri durum ella rættari sagt er byrjað, verður skapt uppá fáar vikur av teimum, »ið vilja prógva, at vit einki megna í Føroyum«. Eisini roynir formaður Tjóðveldisfloksins at billa fólki inn, at fíggjarlógaruppskotið hjá Karsten Hansen fyri 2004 hevði givið yvirskot, um sokallaða fasta búskaparstýringin hevði hildið fram og sparitiltøkini við keksum, posum o.s.fr vóru samtykt. Hetta passar ikki.

Seinastu metingarnar um skattainntøkur fyri 2004 eru 200 milliónir lægri enn, tá fíggjarlógin var løgd fram. Hetta merkir undirskot, óansæð um spariuppskotini hjá Karsten Hansen vórðu samtykt ella ikki. Hesar metingar hava eftir øllum at døma verið kendar millum flokkarnar á tingi, men okkum lysti at frætt, hví Tjóðveldisflokkurin, ið legði so stóran dent á tann sterka búskapin í valstríðnum, einki segði við veljaran um hesa minking uppá 200 milliónir í mettum skattainntøkum. Er slíkur atburður tað, ið Høgni Hoydal vil síggja frá fjølmiðlunum?

Eins og 80’ini høvdu avleiðingar nógv ár fram, og eins og krepputiltøkini undir m.a. Maritu Petersen sálu tryggjaðu framgongd nógv ár fram, so koma avleiðingarnar av slappu stýringini seinastu árini at merkjast nógv ár fram.

Tað er ein grov undirmetan av veljarnum, at fyrigykla honum, at kreppur verða skaptar uppá fáar vikur. Kreppur eru í stoypiskeiini í áravís, og nógvir faktorar bæði innanlands og ikki minst uttanlands geva sítt íkast. Hví man Høgni Hoydal verða so grammur at avnokta krepputeknini, ið standa sólarklár? Kann tað veruliga hugsast, at hann vil pástanda, at kreppur verða skaptar uppá fáar vikur fyri at kunna vaska hendur og geva øllum hinum skyldina, tá núverandi kreppa, ið longu er veruleiki úti um landið, fer at merkjast í kioskum, radiobúðum og hárfríðkanarstovum í Havnini?

Tað sigur nógv um, hvussu formaður Tjóðveldisfloksins kundi hugsar sær fjølmiðlar, tá hann kallar fjølmiðlar ábyrgdarleysar, tí teir leggja merki til, at inntøkur landskassans fyri 2004 verða mettar 200 milliónir lægri enn í fíggjarlógaruppskotinum. Tað skuldi bara manglað!

Í 1988 vóru krepputekin, og vit høvdu ein tjóðveldisfíggjarmálaráðharra, ið sambært sær sjálvum lat ein landskassa á tremur frá sær. Í 2004 hava vit aftur krepputekin og ein tjoðveldisfíggjarmálaráðharra, ið sambært sær sjálvum hevur latið ein landskassa á tremur frá sær. Vónandi kemur søgan ikki heilt at endurtaka seg, men tá formaður Tjóðveldisfloksins roynir at peika á onnur – ja sjálvt fjølmiðlar – fyri at geva teimum skyldina av, at kreppa hómast, so sær ikki bjart út fyri framman. Vónandi fáa vit eina sterka og handlikraftiga samgongu, ið kann skalka sum frægast, áðrenn búskaparligu brotasjógvarnir raka.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Fólksins løgmaður

**Hjørdis Djurhuus**



Tað mundi vera mangur føroyingur, ið fyri og eftir valið, spurdi um veruligu orsøkina til ódámligu viðferðina okkara vælumtókti løgmaður Anfinn Kallsberg fekk av floksformonnunum í hinum stóru flokkunum. At fáa skert virkisfrælsi, tað er ikki eiti á dómir um okkara leiðir. Ein kemur at hugsa um prestastyrið í Iran.

Svarið upp á viðferðina av Anfinni Kallsberg fáa vit frá Justinus Leivsson Eidesgaard blaðmanni í grein í Sosialinum 24.jan. 2004. Í eini sera væl skrivaðari og sakligari grein, ið øll, ið hava áhuga fyri politikki, áttu at lisið.

Tøkk fyri greinina Jústinus Leivsson Eidesgaard.

Øvund hevur mangan verið drívmegin til mangt ódámligt, og hetta er sjálvandi ikki fyrstu ferð, at polittikari hevur kent sviðan av øvund.

Til fólkatingsvalið í 1939 varð Jóannes Patursson ikki uppstillaður av Sjálvstýrisflokkinum, sjálvt um hann hevði bestu møguleikarnar at verða valdur. Tað var tá, Vinnuflokkurin bjóðaði Jóannes Paturssyni at koma upp í flokkin. Jóannes Patursson tók av og bleiv formaður fýri hendan flokk, sum seinni bleiv til Fólkaflokkin. Flokkurin sum Anfinn Kallsberg í dag stendur á odda fyri.

Í sambandi við ráðagerðina ímóti Jóannes Paturssyni tekur skaldið Pól F. Joensen m.a. soleiðis til í heilsan til Jóannes Patursson:

Ov stórur fyri meðal menn / teir fata ei títt viki enn / tí vart tú burtur rikin / men Føroya fólk gav svarið nú / at eingin metist hátt sum tú / ið varð so illa svikin.

Hugsaði, tá ráðargerðin hjá feðgunum Kjartan og Høgna Hoydal í samband við lesarabrøvini frá London varð avdúkað, at hetta boðar ikki frá góðum. Báðir uttan iva serkønir í, hvussu ein politiskur mótstøðumaður verður fyribeindur. Undirgravandi arbeiðið fyri at fella eins egna løgmann má sigast at vera bæði ódámligt og óføroyskt.

At formaður Tjóðveldisfloksins hevur ilt við at góðtaka stóra munin millum tað álit hann og fólksins løgmanður Anfinn Kallsberg hava millum fólk, er skiljandi, men tað má vera eitt mark fyri, hvat fyri vápn verða nýtt í politiskum stríði.

Framferðarhátturin hjá Høgna Hoydal ímóti Anfinni Kallsberg er ein skamblettur í nýggjari politiskari søgu, ein skamplettur, ið føroya fólk seint fara at gloyma.

Í sambandi við leiklutin hjá Jóannes Eidesgaard og Lisbeth L. Petersen at skerja arbeiðsfrælsið hjá Anfinni Kallsberg soleiðis, at hann hvørki kann gerast løgmaður ella landsstýrismaður er at siga, at kanska hava tey sovið í tímanum. Tað sær nú út til, at Lisbeth L. Petersen er vaknað við kaldan dreym, og Jóannes Eidesgaard plagar eisini at vakna sum frálíður.

Eru vit í Føroyum komin niður á tað støði, at »keyptir« blaðmenn og politikarar yvirtaka uppgávuna hjá dømandi valdinum, so boðar hetta frá ófrættindum. Livst so spyrst.

# Skipaður kvinnuhandil í Føroyum

**Annita á Fríðriksmørk og Heidi Petersen**
*løgtingskvinnur Tjóðveldisfloksins*





Í Dimmalætting fríggjadagin 2. januar undrar tað okkum stórliga, tá Finn Ougaard varafúti sigur, at sølulýsingar við útlendskum kvinnum í Føroyskum bløðum ikki er ólóglig. Grundgevingin hjá honum sambært blaðnum er, at »Tað, sum fyrigongur í Teilandi, kann ongantíð koma undir føroyska lóggávu, og tískil er einki ólógligt í einari slíkari lýsing í einum føroyskum blaði«.

Sjálvsagt kann føroysk lóggáva ikki lóggeva um, hvat er rangt og rætt í Teilandi. Men tað, sum undrar okkum er, at gingið verður so lætt um lýsingina í Dimmu, sum eggjar giftum monnum og gomlum dreingjum í Føroyum at keypa sær kvinnur úr Teilandi, Kina og Russlandi. Um hildið verður, at tað er í lagi at lýst verður við sølu av kvinnum úr triðja heiminum, kunnu teir væl saktans eisini lýsa við sølu av børnum, menniskjagøgnum o.s.fr.

Hetta má sigast at verða undir allan moral og ein góðkenning frá ákærumyndugleikanum um, at lýsast kann í føroyskum bløðum við keypi og sølu av kvinnum, bara sølan fer fram uttanlands.

Uttan at gera okkum til dómarar yvir, hvat donsk lóggáva loyvir í Føroyum, so skulu vit bara minna á, hvat t.d. stendur í revsilógini grein 233, har tað stendur soleiðis:

»Den, som opfordrer eller indbyder til utugt eller stiller usædelig levevis til skue på en måde, der er egnet til at forulempe andre eller vække offentlig forargelse, straffes med hæfte eller fængsel indtil 1 år eller under formildende omstændigheder med bøde«.

Nú er tað sjálvsagt upp til ákærumyndugleikan og í síðsta enda dómsvaldið at gera av, í hvørjum einstøkum føri, hvar markið fyri ólevnað og ósiðiligan livihátt gongur.

Men tað undrar okkum, um ikki ákærumyndugleikin og dómsvaldið eru samd við okkum í, at tað er ósigur og ótespiligur ólevnaður at bjóða gomlum dreingjum og giftum monnum at keypa sær kvinnur úr øðrum londum.

Tí er síðsta orðið ikki sagt enn! Sigur danski myndugleikin í Føroyum., at hetta er í lagi, so má hetta reisast í løgtinginum, so skjótt tingið kemur saman aftur.

Vit ætla so at gera tað, sum liggur í okkara makt, fyri at steðga slíkum!


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Aftursvar til Jústinus Leivsson Eidesgaard

**Um Kallsberg er fortaptur í allar ævir – er ein persónligur spurningur Tað er einki beinleiðis samanhang millum at verða valdur á løgting og at gerast løgmaður ella landsstýrismaður.**

**T.d. kann nevnast, at Tjóðveldisflokkurin ongantíð hevur havt løgmann, hóast hann hevur verið størsti flokkur í samgongu og við formanni, sum hevur nógv fleiri atkvøður enn Kallsberg**

**Abraham Mikladal**



At vera løg- ella landsstýrismaður er ikki tað sama sum at vera løgtingslimur.

Tað er staðfest í stýrisskipanarlógini, hvat stødd av lógarbroti er nokk at taka valbærið/órinið frá einum løgtingslimi.

§ 4. Valbærur er hvør, sum hevur valrætt til løgtingið, uttan so er, at hann er revsaður fyri gerð, sum hevur við sær, at hann eftir almannahugsan ikki er verdugur at sita á tingi.
Stk. 2. Tann, ið dømdur er fyri revsiverda gerð, verður ikki óverdugur til tingsess, uttan so, at hann fær fongsulsdóm í 4 mánaðir ella longri, ella trygdarvarðhaldsdóm.
Stk. 3. Heldur ikki er hann óverdugur, tá ið 5 ár eru liðin frá tí, at revsingin er avsitin, fyrnd, ella eftirgivin ella frá endaligari leysgeving úr trygdarvarðhaldi.
§ 24. Eingin løgtingsmaður má uttan samtykki løgtingsins verða ákærdur ella fongslaður á nakran hátt, uttan so at hann verður tikin á búri.
Stk. 2. Eingin løgtingsmaður kann uttan samtykki tingsins verða kravdur til svars uttantings fyri tað, hann hevur sagt innantings.
*(Stýrisskipanarlógin)*

Við løgmanni og landsstýrismonnum er tað annarleiðis. Her er talan um **ÁLIT.**

Spyr bara Kallsberg sjálvan – hann sendi jú Annlis heim orsakað av væntandi áliti.

§ 29. Loystur skal verða úr embæti løgmaður ella landsstýrismaður, ið biður um tað. Løgtingsformaðurin loysir løgmann úr embæti, og løgmaður loysir landsstýrismann úr embæti.
Stk. 2. Løgmaður kann eisini í øðrum førum loysa úr embæti landsstýrismann og skal loysa landsstýrismann úr embæti, um tað við atkvøðugreiðslu í løgtinginum, har ið meira enn helmingur av øllum tingmonnum atkvøður fyri, verður samtykt, at løgtingið ikki longur hevur álit á landsstýrismanni.
§ 30. Um tað við atkvøðugreiðslu á løgtingi, har ið meira enn helmingur av øllum tingmonnum atkvøður fyri, verður samtykt, at løgtingið ikki longur hevur álit á løgmanni, skal løgmaður biðja løgtingsformannin loysa seg úr embæti.
*(Stýrisskipanarlógin)*

Orsøkin til, at Tjóðveldisflokkurin, og eftir øllum at døma Javnaðar- og Sambandsflokkurin eisini, ikki ynskja Kallsberg sum ráðharra, er vantandi **ÁLIT.**

Málið um Kallsberg, snýr seg ikki bara um, hvat hann hevur gjørt í fortíðini. Tað átti at verið avgreitt rættarliga, og so var tað staðfest. Men málið snýr seg um, hvat hann hevur gjørt sum løgmaður.

Kallsberg hevur ferð eftir ferð logið fyri Føroya fólki um sína fortíð. Hann hevur brúkt løgmansembætið til at hótta eina samgongu til at fjala út yvir sína fortíð, og hann hevur slitið eina samgongu til tess at verja sín egna persón. Hartil hevur hann sum løgmaður borið í bøtuflaka fyri lógarbrot og sagt, at tað er í lagi, um bert tað tænir einum endamáli.

**Um hetta verður góðtikið, so kann ongin hava álit á løgmansembætinum nakrantíð.**

- Hugsa tær, um tað eitt nú var fútin ella dómarin, sum fingu okkurt mál fram, um at teir høvdu framt lógarbrot.
- Hugsa tær, um teir síðani hóttu síni starvsfólk og fjølmiðlarnar við at tað fór at fáa avleiðingar um tey ikki tóku orð síni aftur.
- Hugsa tær, um teir síðani sendu øll starvsfólkini til hús, tá tað kom fram, at teir høvdu logið.
- Og hugsa tær, um teir síðani søgdu, at tað var í lagi at fremja lógarbrot, tí tað tænti einum endamáli.

Um hetta ikki hevði fingið avleiðingar, hvør hevði tá nakrantíð kunnað havt álit á landsins hægstu embætum?

Men hevði Kallsberg lagt kortini á borðið, sagt allan sannleikan og biðið um fyrigeving, so hevði hann fingið hana – eisini frá Tjóðveldisflokkinum – tað boðaði hann greitt frá beinanvegin.

Tú veitst Jústinus – at treytin fyri at **fáa fyrigeving** er at **biða um fyrigeving** og tað hevur Kallsberg ikki gjørt. Nei hann var og er harðhjartaður og kastaði Føroyar ferð eftir ferð út í stjórnarkreppu. *(Hjartagóður maður ger væl við seg sjálvan, men hin harðhjartaði forkemur sær. Orðt. 11:17)*

Í løtuni stendur hevnd ovast á dagskránni hjá Kallsberg.

Tað fer óivað at eydnast honum í fyrstu atløgu, men betur man sannleikin og evnini at seta mark millum rangt og rætt fara at roynast í longdini.

Eg eri errin av at hoyra til ein flokk, sum tordi og megnaði at seta mark ímillum rangt og rætt. Tað skal fara at vísa seg, at vera ein stórsigur fyri føroyska fólkaræði.

*Fyri tí, tú veitst, er rætt,*
*doyggj, um so má vera;*
*tá skal lívið falla lætt,*
*deyðin einki gera.*

**Rættvísi sigrar at enda!**

# Samgongur

**Zakarias Wang**



Valið 20. januar 2004 var ein sigur fyri sjálvstýristilgongdina í Føroyum. Teir flokkar, sum hava stríðst við hond og fót ímóti at vit skulu gerast eitt sjálvstøðugt ríki, høvdu fyri valið 46,9% av atkvøðunum. Valdagin tann 20. januar fingu teir 45,6, ein afturgongd upp á 1,3%. Har afturat kom, at tí vallóg fyri at takka, sum javnaðarløgmaðurin í 1978 við undirtøku frá Sambandsflokkinum fekk ígjøgnum, misti Sambandsflokkurin ein mann. Úrslitið er sostatt, at teir flokkar, sum eftir valið 1998 fóru til verka við tí bjarta endamáli at vinna okkum frælsi, fingu 16 av 32 tinglimum, og einki landsstýri kann skipast uttan um teir.

Stóðu hesir flokkar saman, so var bara at fáa ein tingmann afturat at lata vera við at atkvøða ímóti teimum, og so kundu teir stýrt Føroyum fram til 20. januar 2008. Hetta skuldi ligið væl fyri, tí í tí samgongu, sum var skipað eftir valið í 2002, var Miðflokkurin eisini við, og hann hevur ikki sambandspolitikk sum sítt fremsta mið. Hesin flokkur var tann veruligi vinnarin av valinum og fór eitt umboð fram.

Nú skuldi so bara verið at hildið saman hjá sjálvstýrisflokkunum.

Men tíverri tykist støðan at vera sum í Runsival á sinni, tá ið tólvjavningarnir viltust og hvør mót øðrum slóg. Tað er nevnliga vandi fyri, at persónligt agg kann forkoma sjálvstýristilgongdini.

Skuldi hetta hent, so vita vit eitt, og tað er, at gleðirómurin hevði ljómað hvøllur á Christiansborg. Síðan landsstýrið varð skipað í 1998 hevur danska stjórnin og hennara skutilssveinar ligið sjálvstýrissamgonguni eftir lívinum. Hesar myrkursins kreftir hava nýtt øll vápn fyri at forða hesum landsstýri at seta í verk bjørtu ætlan sína.

Hetta má ikki eydnast teimum!

Øll orsøk er hjá hesum flokkum at seta seg niður at fáa greiðu á teimum illstøðum, sum eru íkomnar, og fáa tær beindar av vegnum. Tað ber ikki til, at Føroya land ikki skal fáa frælsi, av tí at teir menn og tær kvinnur, vit hava sett okkara álit á, í hesu lagnustund seta sín egna persón fram um bjarta mál okkara.

# Tey gera okkum rík

**Anna Djurhuus**

Hoyrdi í tíðindunum fyri nøkrum vikum síðani um, at læknar høvdu funnið fram til eina tøkni, sum kundi ávísa, um kvinna við barn bar barn við Downs syndrom (mongolismu) undir belti. Tað ljóðaði fyri mær, sum um hetta vóru gleðilig tíðindi, ella ein sensatión. Jú, vit einum skannara kundu læknar kanna, um barnið hevði ein ávísan nakkafald. Um so var, bleiv tilboð givið um at gera ein fosturvatnsroynd, sum so endaliga kundi staðfesta, um tað veruliga var Downs syndrom. Barnið kundi so takast.

Við hesum blivu »bert« 5 børn við Downs syndrom fødd í Danmark um árið ístaðin fyri 60-70.

**Annað floks menniskju?**
Eg sat eftir við einari løgnari kenslu, tá eg hevði hoyrt tíðindini og hugsaði við mær sjálvari: Hvat mugu foreldur at børnum við Downs syndrom hugsa, hvat mugu tey sjálvi hugsa. Eru hetta »2. floks menniskjur«.

Eg eigi sjálv fimm sokallað vælskapt børn, og kann kanska ikki seta meg í stað teirra, sum eiga børn við breki, men eg veit bert, hvat tey sjálvi siga.

**Vælskapt brek**
Fyri nøkrum árum síðani kom fløga út, ið var nevnd vælskapt brek, har ljós bleiv sett á børn við viðføddum breki. Var sjálv á konsertini, ið bleiv hildin í Norðurlandahúsinum. Ein sera góð og rørandi konsert, har temaið var, hvørja gleði hesin bólkur av børnum ber sínum kæru og øðrum við.

Heiti vælskapt brek er eitt ógvuliga vælvalt og sigandi heiti.

**Ein ríkt tjóð!**
Í kvøld 25. januar 2004 Føroya um daglidagin hjá Jóannesi Jacobsen, við hansara arbeiði millum menningartarnað. Eg má siga, at tá eg sá M´as Blues Band spæla í Vestmanna skúla, tá rørdist mítt hjarta, og eg hugsaði. Vit eru rík sum samfelag, at eiga hendan vælsignaða bólkin av menniskjum, sum skapa slíka gleði rundan um seg har tey eru. Tøkk skal Jóannes hava, sum í síni frítíð ger hetta frálíka arbeiði fyri at gleða okkum øll. Man tað ikki verða, tí hann sjálvur er vorðin ríkari at vera saman við teimum?

**Vit verða fátæk uttan tey**
Eg hugsi, um vit sum samfelag skulu sleppa okkum av við tann bólkin av menniskjum við Downs syndrom, hvør verður so tann næsti bólkurin?

Eru við blivin, sum Hitler í nazi tíðini har hann skuldi hava eina reina ariska rasu? Nei, eg spyrji bara. Eitt veit eg, at tá verða vit ógvuliga fátæk sum tjóð, og Gud forbjóði, at so verður.

**Tey gera okkum rík!**
Zacharias Zachariasen, hevur yrkt ein sang um Brekaða barnið, har síðsta ørindi ljóðar:

*Júst hetta lítla barn,*
*ið mikið brekað var,*
*mest gleði teimum vann*
*og størstu signing bar.*
*Og har, sum sorgin neit,*
*og royndin var so svár,*
*nú hoyrist takkarljóð,*
*og skyggja gleðitár.*

Hetta er tað sum eg hoyri og síggi foreldur, avvarðandi og onnur sum hava við brekað og menningartarnað at gera siga.

Tí haldi eg, at vit sum samfelag heldur skuldi hjálpt teimum meir og givið teimum betri kor og sømdir, sum tað sømir seg einum ríkum samfelag, tí tey gera okkum rík.

Sjálv bleiv eg ríkari í


**Til sølu**

Lítil persónbilur Fiat Cinquecento, árg. 11/95 í sera góðum standi.

Lagalig fígging.

**Bilfríðkan**
Velbastaðvegur 78
**Tel. 317300 ella 217300**